## Tikararnir góvust

Loysingarrørslan har norðuri á Sri Lanka, Tamilsku Tikararnir, hava fyribils tikið seg burtur úr samráðingunum við stjórnina um at finna eina varandi loysn á borgarakrígnum.

Í einari kunngerð frá loysingarrørsluni annan páskadag stóð, at rørslan hevði gjørt av at gevast við samráðingunum.

Keldur í Colombo siga, at loysingarrørslan hevur tikið seg burtur úr samráðingunum, tí hon er sera misnøgd við partar av samráðingargrundarlagnum. Noreg hevur havt ein virknan lut í arbeiðinum at fáa varandi frið á Sri Lanka, og norskir diplomatar hava verið við til at gera samráðingargrundarlagið.

## Skip smuglaði heroin

Páskadag tóku avstralskir hermenn seg umborð á eitt norðurkoreanskt farmaskip, eftir at skiparin hevði sýtt fyri at steðga.

Avstralsku myndugleikarnir siga, at tað 4.000 tons stóra farmaskipið Pong Su virkaði sum móðurskip hjá smáum bátum, sum verða nýttir til at smugla heroin til Avstralia. Myndugleikarnir vilja vera við, at skipið hevur fermt minst 50 kilo av heroini umborð á teir smáu bátarnar, sum síðani hava siglt tað til lands.

Norðurkoreanska skipið sigldi undir flagginum hjá lítla oyggjalandinum Tuvaiu, men øll manningin var úr Norðurkorea. Menninir sita nú í varðhaldi í Avstralia, og teir verða eftir øllum at døma vístir av landinum.

## Ákærin einmælt valdur

Annan páskadag varð argentinski Luis Moreno Ocampo formliga valdur til høvuðsákæra hjá nýggja altjóða revsidómstólinum í Haag.

Luis Moreno Ocampo fekk atkvøðurnar hjá øllum teimum 78 londunum, sum higartil hava viðurkent dómstólin, ið skal viðgera álvarssom krígsbrotsverk ímóti mannaættini. Roknað verður við, at hann verður tikin í eið tann 16. juni.

Ocampo var í áttatiárunum ein av undangongumonnunum fyri at fáa fyrrverandi argentinska hernaðarstýrið drigið fyri rættin, og longu fyri trimum vikum síðani var greitt, at hann fór at verða tilnevndur høvuðsákæri við nýggja dómstólin.

## Kent skipsvrak funnið

Ein týskt sjónvarpslið hevur funnið vrakið av týska flóttafólkaskipinum Goya, sum varð søkt tann 16. apríl í 1945.

Tað var ein sovjetskur kavbátur, sum søkti skipið í Eystrasalti, og hildið verður, at næstan 7.000 fólk, tey flestu kvinnur, børn og eldri fólk, doyðu. Vrakið varð funnið á 50 favna dýpi á Gdanskvíkini smáar tveir fjórðingar frá staðnum, har tað var statt, tá sovjetski kavbáturin rakti tað við tveimum torpedoum. Tilburðurin tann 16. apríl í 1945 hevur ofta verið umrøddur, og einstakir kendir rithøvundar hava eisini skrivað um hann.

Tað var í sambandi við upptøkurnar til eina sending um týsk flóttafólkaskip, at eitt sjónvarpslið hjá Mitteldeutsche Rundfunk kom fram á vrakið av Goya.

# Børn verða fødd við SARS



*Sambært WHO breiðir SARS seg skjótt í Hongkong, hóast myndugleikarnir royna at steðga smittuni. Her eru tað skúlanæmingar í Hongkong, sum noyðast at sita við masku í skúlastovuni*

**Lungnasjúkan SARS breiðir seg skjótt í Kina og Hongkong, og á páskum vórðu tey fyrstu børnini fødd við sjúkuni, tí mamman hevði smittuna í sær.**

SARS-SJÚKAN
*Árni Joensen*

Á einum sjúkrahúsi í Hongkong stríðast læknarnir nú við at bjarga trimum nýføðingum, sum eru í lívsvanda, tí mammur teirra høvdu ta herviligu lungnasjúkuna SARS. Læknarnir siga, at teir noyðast at nýta sterkan heilivág, sum vanliga bert verður nýttur til vaksin fólk.

Felags fyri tey trý børnini er, at tey vórðu fødd ov tíðliga, og læknarnir dylja ikki fyri, at tey eru ógvuliga sjúk. Tey hava trupulleikar við andadráttinum og onnur sjúkueyðkenni, ið minna um SARS, men tað er kortini ikki endaliga staðfest, at børnini veruliga hava fingið sjúkuna.

- Vit noyðast at hava tey undir eftirliti eina tíð frameftir, tí vit mugu tryggja okkum, um tey hava fingið virusið ella ikki, segði læknin Liu Shao-haei á sjúkrahúsinum í Hongkong í gjár.

Heimsheilsustovnurin WHO viðgongur, at SARS hevur breitt seg skjótari, enn stovnurin hevði roknað við. Leiðarin á smittudeildini hjá WHO, David Heymann, sigur, at higartil hevur stovnurin fingið vissu fyri, at 209 fólk eru deyð av sjúkuni, og at meiri enn 3.900 sjúklingar eru smittað. Hann ivast ikki í, at tað veruliga talið er væl størri, serliga í Kina.

Kinesisku myndugleikarnir viðgingu fyri nøkrum døgum síðani, at teir høvdu ikki sagt sannleikan um, hvussu útbreidd sjúkan er har. Eitt nú varð sagt, at 37 fólk í høvuðsstaðnum Beijing vóru smittað, men seinni søgdu myndugleikarnir, at tað rætta talið var 339.

Um vikuskiftið gjørdi myndugleikarnir at koyra leiðaran í almenna heilsuverkinum og ein borgarstjóra frá. Almenna grundgevingin var, at teir høvdu ikki handfarið SARS á sømiligan hátt.

# Amerikanski sukurídnaðurin í stríð við WHO

**Við Coca Cola og Pepsi Cola á odda roynir amerikanski sukurídnaðurin at forða WHO at almannakunngera eina frágreiðing, sum mælir fólki til at nýta minni sukur.**

HEILSUFRÁGREIÐING
*Árni Joensen*

Sukurídnaðurin í USA roynir av øllum alvi at forða heimsheilsustovninum WHO at almannakunngera eina frágreiðing um óhepnar matvanar hjá fólki.

Í frágreiðingini, sum eftir ætlanini skal almannakunngerast í dag, stendur millum annað, at fólk eiga at skarva tíggju prosent av dagligu sukurnýtsluni.

Hetta hevur fingið øði í amerikanska sukurídnaðin, og sambært útlendskum fjølmiðlum hevur ídnaðurin hótt WHO við fíggjarligum tiltøkum, verður frágreiðingin almannakunngjørd. Tað eru serliga Coca Cola, Pepsi Cola og aðrar stórar amerikanskar fyritøkur, sum ganga á odda í stríðnum ímóti frágreiðingini.

Stjórin í WHO, fyrrverandi norski forsætisráðharrin Gro Harlem Brundtland, hevur ikki sagt nakað um stríðið við amerikansku fyritøkurnar, men talsmaður hennara segði í gjár, at heimsheilsustovnurin letur seg ikki kúga av áhugamálunum hjá amerikanska sukurídnaðinum.

Í einum brævi til WHO siga tær amerikansku fyritøkurnar, at tær ætla sær ikki at góðtaka frágreiðingina, og at tær eru til reiðar at nýta politiskt trýst fyri at noyða WHO at slaka. Men talsmaðurin hjá Gro Harlem Brundtland sigur, at har vænta tey ikki, at Kongressin fer at lata seg ávirka í hesum málinum.





# Grannarnir vilja hava USA úr Irak sum skjótast

**Spenningurin veksur í teimum arabisku londunum, og grannalondini hjá Irak vilja hava amerikanararnar at fara úr Irak sum skjótast. Samstundis skulu teir gevast við atfinningunum at Sýrialandi.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*



*Eisini í sjálvum Irak harðnar mótstøðan ímóti amerikanarum og bretum. Her krevja  shiittar í býnum Kerbala, at amerikansku og bretsku hermenninir skulu fara úr landinum.*

Allar yvirlýsingar og samtyktir, sum kom úr londunum í Miðeystri í hesum døgum, hava ein felagsnevnara: Amerikanararnir eiga at fara úr Irak sum skjótast og heldur í dag enn í morgin.

Tað var eisini niðurstøðan Langa fríggjadag, tá uttanríkisráðharrarnir í grannalondunum hjá Irak hittust til fundar í Riyadh í Saudiarabia saman við starvsbrøðrunum úr Egyptalandi og Bahrein. Boðskapurin her var tann sami sum týsdagin í síðstu viku, tá samstarvsfelagsskapurin hjá teimum seks flógvalondunum, GCC, helt fund í sama býi.

Á fundinum Langa fríggjadag nýtti saudiarabiski uttanríkisráðharrin, Saud al-Faisal, orðið "vit" og tosaði sostatt vegna øll londini, tá hann segði, at amerikanska og bretska hersetingarvaldið í Irak eigur at tryggja viðurskiftini í landinum og at fáa eina irakska stjórn skipaða, soleiðis at amerikansku og bretsku hermenninir kunnu verða tiknir aftur so skjótt, tað letur seg gera.

Hetta merkir kortini ikki, at Saudiarabia, Turkaland, Iran, Jordan, Sýrialand og Kuwait eru á einum máli um allar smálutirnar í spurninginum um, hvussu Irakmálið skal loysast, ella hvønn lut USA skal hava í hesum máli. Egyptaland hevur eisini sína egnu støðu, og Bahrein kom bert á fundin, tí landið hevur í løtuni formansskapin í Arabisku Samgonguni. Men samstundis er eingin ivi um, at tann hernaðarliga amerikanska og bretska hjáveran í Irak elvir til ótta millum stjórnirnar í hinum londunum. Tann skjóti sigurin í Irak og amerikansku hóttanirnar ímóti Sýrialandi gera ikki stjórnirnar tryggari.

Í setanarrøðuni vísti saudiarabiski uttanríkisráðharrin øllum skuldsetingum og hóttanum ímóti Sýrialandi aftur, og hann segði, at hesar kunnu gerast byrjanin til eina ónda ringrás, sum hann tók til. Hann bað USA og ST síggja til, at friðartilgongdin í Palestina verður tikin uppaftur, og at ágangurin hjá ísraelska herinum verður steðgaður.

- Vit hava liðið nóg mikið seinastu nógvu árini, segði Saud al-Faisal.

### Fólkið á gøtuni

Saudiarabia verður vanliga roknað sum ein tann trúgvasti sameindi hjá USA í øllum Miðeystri, og tíðindafólk, sum vóru á fundinum Langa fríggjadag, undraðust eisini á orðalagið hjá saudiarabiska uttanríkisráðharranum. Eygleiðarar siga, at orðini hjá al-Faisal eru enn eitt prógv um, at nógvir arabarar kenna seg ótryggar, tí teir vita ikki við vissu, hvørji mál USA veruliga hevur sett sær í økinum. Fundurin var samstundis eitt tekin um, at tær arabisku stjórnirnar kenna seg undir trýsti, men hann var eisini eitt tekin um, at londini eru ikki heilt samd, tá tað snýr seg um framtíðar Irak og sambandið við tað.

Óvissan um amerikansku ætlanina sást aftur í, at londini vilja hava ST at standa fyri arbeiðinum at endurreisa Irak. Men orðalagið í teirri endaligu fráboðanini var kortini ikki so hvassorðað sum setanarrøðan, tí fráboðanin var týðiliga ein neyðloysn. Tað er eisnki at ivast í, at í hvussu er Iran hevur havt tann hvassa pennin frammi, meðan lond sum Turkaland og Saudiarabia ivaleyst hava valt tað hóvliga orðalagið.

Men í Sýrialandi og ikki minst í Egyptalandi og Jordan noyðast stjórnirnar at hugsa um ta stóru mótstøðuna, sum er í teimum londunum ímóti amerikansku og bretsku hjáveruni í Irak. Rætt er tað, at mótmælini hava ikki verið so mong og so umfatandi, sum roknað varð við, men stjórnirnar vita kortini, at mótstøðan í fólki teirra er stór. At ikki ein einasta mótmælisgonga var í Saudiarabia ímóti amerikanska og bretska átakinum í Irak sigur valla sannleikan, tí myndugleikarnir høvdu longu frammanundan sett bann fyri slíkum mótmælisgongum.

- Men fólkið í teimum arabisku gøtunum hevur sjálvandi ávirkan. Annars høvdu stjórnirnar ikki vent sær so harðliga ímóti USA, segði ein limur í serliga trygdarráðnum í Saudiarabia og legði afturat:

- USA hevur mist sínar seinastu vinir í hesum landi.

### Eingin tók av

Misnøgdin við amerikanararnar og óvissan um teirra veruliga ætlan við álopinum á Irak kom eisini týðiliga til sjóndar nýliga.

104 saudiarabiskir menn, sum høvdu skrivað undir eina áheitan á myndugleikarnar um størri demokrati, vórðu bodnir á eina samkomu á amerikansku sendistovuni í Riyadh. Men ikki ein einasti tók av innbjóðingini. Kona sendiharran hevði samstundis boðið konunum hjá teimum 104 á sendistovuna, men bert tríggjar teirra komu. Tað hoyrir við til frásøgnina, at sambært einum vesturlendskum diplomati í býnum fóru tær tríggjar kvinnurnar skjótt avstaðaftur, tí tær hildu ikki temunnin hjá sendiharrafrúuni vera í lagi. Hetta er annars sera óvanligt í Saudiarabia.

Saudiarabia hevur biðið USA taka sínar hermenn av Prins Sultan-herstøðini, og í síðstu viku varð váttað, at teir flestu amerikansku hermenninir verða fluttir haðani. Bæði Saudiarabia og Jordan hjálptu amerikanarunum í krígnum í Irak. Nú er arbeiðið liðugt, og nú vilja londini hava amerikanararnar burtur. Tær hava nóg mikið at takast við innanhýsis.

# Bretskir hermenn funnir í grøv við Basra

**Líkini av tveimum bretskum hermonnum, sum hvurvu tíðliga í krígnum í Irak, eru funnin í einari grøv.**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen:*

Ein av teimum fyrstu døgunum í krígnum í Irak mistu bretar tveir hermenn. Tað vóru tann 24 ára gamli Luke Allshopp og tann 36 ára gamli Simon Cullingworth.

Nakrar dagar seinni vísti arabiska sjónvarpið al-Jazeera myndir av teimum báðum líkunum. Í Bretlandi vóru fólk í øðini, og Tony Blair, forsætisráðharri vildi vera við, at irakar høvdu avrættað teir báðar hermenninar.

Nú eru líkini funnin í einari grøv nærhendis býnum Basra har suðuri í Irak. Ein talskvinna hjá verjumálaráðnum í London segði í gjár, at enn er ikki staðfest, hvussu teir báðir menninir doyðu, men at tað verður kannað. Hon legði afturat, at tað verður eisini kannað, um menninir vórðu avrættaðir.

Tað vóru fólk í Basra, sum kunnaðu bretar um, hvar teir báðir menninir lógu jarðaðir. Tey vistu at siga, at tað vóru limir í Bath-flokkinum hjá Saddam Hussein, sum jarðaðu teir í oyðimørkini uttan fyri býin.